GÍ-TB 2-0 (1-0):

# TB vísti vilja

**Hóast avrikið hjá TB hesuferð var nógv betri enn í tveimum teimum seinastu dystunum, so rakk tað ikki til stig í Gøtu**

FÓTBÓLTUR
*Bjartur Nolsøe*



Bæði GÍ og TB høvdu nógv at spæla fyri, tá tey hittust í Gøtu sunnudagin. GÍ hevði bert fingið ein sigur í fýra teimum fyrstu dystunum, meðan TB aftaná sigurin á VB í fyrsta dystinum, ikki hevði fingið stig.

Og TB stillaði haraftrat upp við nýggjum venjara, eftir at Zoran Mancic fekk sekkin í síðstu viku.

### GÍ trýsti

Og tað sást beinanvegin, at bæði liðini høvdu nakað at vísa. GÍ legði sum væntað trýst á útiliðið. Spælið gekk gott fyrstu løtuna, og komu gøtumenn eisini fram til onkrar hálvar málmøguleikar.

Tvøramenn lógu aftarlaga á vøllinum, og sjálvt um teir sluppu at renna nógv fyrstu løtuna, so stríddust teir, allir sum ein, fyri hvønn bólt. Og høvdu teir ikki verið so ágrýtnir, høvdu gøtumenn uttan iva fingið okkurt máli fyrstu løtuna.

Hvørja ferð GÍ kom fram móti brotsteiginum, so blivu teir steðgaðir og komu teir longur inni í brotsteiginum, fingu tvøramenn taklað, so skotroyndin bleiv av ongum. Komu gøtumenn til skot, so bjargaði Lars Mùller í málinum. Hann stóð ein frálíkan dyst.

Heilt snikkaleysir sluppu TB-arnir tó ikki. GÍ fekk ein góðan møguleika tá okkurt um korter var farið. Zdzislaw Janik fangar ein bólt uttan fyri brotsteigin hjá TB. Hann spælir Súna Fríða Johannesen púra leysan, men hann skýtur við síðuna av. Súni Fríði virkaði ikki heilt upplagdur henda dagin, og á einum av sínum góðun døgum, hevði hann skorað uppá henda møguleikan.

### TB meira við

Sum fyrri hálvleikur leið, komu tvøramenn meiri við í dystin. Teir fingu meiri pláss, og fingu eisini flutt liðið eini 20 metrar fram á vøllin. Hetta gav teimum eisini nakrar møguleikar. Fyrst var tað Dan Mortensen sum skeyt beint yvir, eftir eitt innlegg úr vinstru síðu, og løtu seinni var tað Oliver Abrahamsen sum streyk ígjøgnum í høgru síðu, men frammanfyri málið var ongin tvøráma-ður, tá innleggið kom innfyri.

Gøtumenn vóru eitt sindur skelkaðir hesa løtuna. Nógvar skeivar avleveringar, umframt at tvøramenn stríddist fyri lívinum, gjørdi at spælið ikki hekk saman.

Tá 10 minuttir eru eftir av fyrra hálvleiki, fingu gøtumenn sítt fyrsta mál burtur úr ongum. Bólturin verður spældur inn í brotsteigin, har Bartal Eliassen er staddur. Verjan hjá TB er ikki nóg avgjørd, og áðrenn teir fáa sparka bóltin vekk, hevur Bartal smekkað bóltin í málið.

Hetta varð eisini hálvleikstøðan, sjálvt um GÍ fekk eini tvey góð tilboð aftrat seint í hálvleikinum. Spenningurin var tí varðveittur til seinna hálvleik.

Seinni hálvleikur gjørdist javnur. Gøtumenn hugsaðu meir um at varðveita leiðsluna, og lógu tí ikki so langt frammi á vøllinum, men bíðaðu eftir at TB skuldi koma fram. Og tvøramenn komu fram á vøllin, og hetta gav sum verða man mótálop til GÍ.

Súni Olsen fekk ein góðan møguleika at økja, men Lars Mùller bjargaði í tveimum førum. Løtu seinni spældi Magni Jarnskor Súna Fríða leysan, men hann skeyt uppum málið hjá TB.

Tvørámenn fingu eisini nakrar góðar royndir. Dan Mortensen sum arbeiddi væl allan dystin, royndi seg við skoti úti frá sum endaði á stongini. Og miðskeiðis í seinna hálvleiki fekk Sascha, í eini knappari vending, skoti beint yvir GÍ-málinum.

### Luftin úr tvørámonnum

Tá TB ikki fekk úrtøku av royndunum teir høvdu, dovnaði spælið hjá teimum síðsta partin av dystinum. Gøtumenn kundu nú koyra sigurin heim. Teir hildu bóltin nógv á egnari hálvu, og hetta fingu teir loyvi til, tí luftin var við at fara úr tvørámonnum.

Tá okkurt um 12 minuttir eru eftir at leika, fellur so avgerðin. Sámal Joensen vinnur ein bólt nakað uttanfyri brotsteigin hjá TB. Hann spælir Súna Fríða leysan, men í staðin fyri at skjóta sjálvur, spælir Súni Fríði tvørturum aftur til Sámal, sum lætt kann økja til 2-0.

Nú hendi ikki meir, og GÍ fekk sín næsta sigur í ár og er komið uppá 7 stig. TB hevur framvegis 3 stig, sum teir fingu í fyrsta dystinum móti VB.

Samanumtikið ein uppiborin sigur til GÍ. Teir høvdu bóltin mest, og høvdu eisini flestu málmøguleikarnar, men spælið bleiv ongantíð tað heilt stóra upplivilsi.

Tvørámenn góvu í hvussu so er eina ábending um, at teir ikki ætla at geva skarvin yvir. Teir stríddust væl, og kunnu teir halda fram við tí teir vístu í sunnudagin, skulu tað nokk koma nøkur stig á kontoina.

### Dysturin í tølum:

**GÍ-TB 2-0 (1-0)**
1-0: Bartal Eliassen
2-0: Sámal Joensen
**Dómari:** Eiler Rasmussen

**GÍ:** Hallur Hansen – Hans Pauli Petersen, Bartal Eliassen, Pól Ennigarð, Leivur Hansen – Magni Jarnskor, Sámal Joensen, Zdzislaw Janek, Súni Olsen – Súni Fríði Johannesen, Magnus Skoralíð

**TB:** Lars Müller - Nebosja Urtajl, Vladimir Matijivic, Jón Tórur Holm, Einar Petersen, Dan Mortensen, Bárður Dimon, Allan Michelsen, Andras Nolsøe, Olivur Abrahamsen, Aleksandar Radosavljevic

KÍ-Sumba 1-1 (0-1):

# Sumbingar mistu

**Nógvi vindurin á norðoyastevnu gjørdi tað trupult hjá liðnum báðum at fáa glið á nakað fótbóltsspæl**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Sumbingar eru framvegis á odda í aðru deild, men nú er av álvara farið at sansa at. Næsti javnleikurin upp í slag varð veruleiki á norðoyastevnu, og munurin til FSV á øðrum plássi er nú eittans stig.

### Truplar umstøður

Vánaligu veðurlíkindini gjørdu sítt til, at tað gjørdist ein heldur linligur norðoyastevnudystur, tá Sumba vitjaði í Klaksvík. Ilt var at fáa nakað skipað fótbóltsspæl í lag, og yvirhøvur tóktist tað hjá leikarunum at ráða meira um at sparka, heldur enn at spæla eftir jørð, sum aloftast er tað skilabesta í slíkum veðrið.

Veðrið hevði eisini ein fingur við í spælinum, tá sumbingar í fyrra hálvleiki løgdu seg á odda. Dánjal Joensen kom ígjøgnum í síðuni, men tá hann skuldi senda innfyri, varð bólturin tikin beina kós móti málinum, uttan at málverjin hevði nakran møguleika at verja fyri.

Sumbingar høvdu eisini aðrar møguleikar í fyrra hálvleiki, tá teir høvdu vindin við sær, men meira enn hetta eina málið fingu teir ikki, og tað var ov lítið at tryggja teimum sigurin.

Tað eydnaðist nevnliga KÍ at javna, tá eitt útspark frá Sumba-verjuni endaði í vindinum. Marisu N. Hansen kom at standa púrasta leysur, og hann takkaði fyri við at smekka bóltin í meskarnar. Altso eitt vindmál í part til liðini.

### Næsta liðið kemur

Sum nevnt, so er Sumba framvegis á odda í deildini, og enn eru teir sum einasta lið ósigraðir.

Men javnleikir eru ikki nóg mikið í longdini. Komandi vikuskifti kemur LÍF á vitjan, og tá skal talan helst verða um trý stig, um oddasessurin framvegis skal varveitast. KÍ tekur ímóti vágamonnum, og so er spurningurin, hvørt teir eisini megna at taka stig frá teimum.

KÍ og Sumba býttu stigini, tá tey leygardagin spældu norðoyastevnudystin

**KÍ-Sumba 1-1 (0-1)**
0-1: Dánjal Johan Joensen
1-1: Marius Nystrøm Hansen

*puslispæl*







*Hóast tað er Skála, sum er fyrst á bóltinum, so hjálpti tað lítið, tá samanum kom. NSÍ vann ein tryggan sigur, og halda teir sostatt framvegis fast í oddaliðnum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

NSÍ-Skála 3-1 (2-1):

# NSÍ heldur kósini

**Runavíkingar snávaðu ikki hesaferð, og nú er liðið veruliga partur av føroyska fótbóltsoddinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Undanfarin ár hava runavíkingar ofta hótt við at koma upp í part, tá tosað verður um føroyska fótbóltsoddin, men onkursvegna hava teir hvørja ferð kikslað, tá møguleikin hevur verið til staðar.

Sum onkur hevur tikið til, so hava teir spælt sum heimsmeistarar í Gundadali móti HB, fyri síðani at tveit alt burtur móti onkrum av lægri staddu liðunum, men í ár tykist vera vent í holuni.

### Skála svaraði aftur

Runavíkingar spældu nevnliga sum alt annað enn heimsmeistarar, tá teir í fyrsta umfarinum fingu bank frá HB í Gundadali, men síðani hevur gingið framá. Ein málleysum javnleiki í Vági – sum heldur ikki man vera heilt av leið - og tveir sigrar vóru úrslitini síðani tað, og sunnudagin øktu teir talið av sigrum upp í trý, tá Skála kom á vitjan.

Talan var um grannauppgerð, og tó at ein slík ofta inniber javnar og spennandi dystir, har leikliga góðskan kanska ikki er í hásætinum, so megnaði NSÍ hesa ferð at spæla seg til ein sannførandi sigur, sum væl kundi verið størri, um neyvleikin í avgerandi løtunum hevði verið størri.

Beint sum dysturin byrjaði løgdu teir á heimaliðnum stórt trýst oman móti gestunum, og tað var eisini skjótt, at hetta kastaði nakrar málmøguleikar av sær.

Í einum tveimum førum var Christian Høgni Jacobsen spældur mest sum púrasta leysur, men hann fekk ikki umsett hetta til mál, og heldur ikki var eydnan við runavíkingunum, tá royndir vóru gjørdar at skjóta útifrá.

Tí mundi tað kennast sum vátur vøttur, tá Skála miðskeiðis í hálvleikinum legði seg á odda. Pauli Hansen, sum er sjálvsagdur fúsur á miðvøllinum hjá Skála sendi bóltin inn um verjuna til Alexandur Johansen, og einsamallur við Jens Martini var skálamaðurin ísakaldur og sendi bóltin trygt í kassan.

### NSÍ átti alt

Málið gjørdi sjálvandi, at fortreytirnar hjá Skála at dúva upp á verjufótbólt og kontraálop gjørdust enn betri, og teir tóku seg alt longri aftur á vøllin í royndunum at verja fyri.

Hetta hevði so eisini við sær, at heimaliðið yvirtók alt meira av spælinum, og tað gekk heldur ikki long tíð, áðrenn javnvág var komin í roknskapin. Kviki Jónstein Petersen varð sendur avstað vinstrumegin, og tá hann sendi bóltin lágt inn fyri málið, var Óli Hansen fyrstur á

Runavíkingar hildu á fram at trýsta spælið oman á Skála hálvuna, og tað stóð leingi heilt nógv á hjá Skála, áðrenn NSÍ fimm minuttir fyri steðgin legði seg á odda. Bólturin varð sendur innfyri eftir hornaspark, og har var Djóni N. Joensen hægstur og stýrdi í netið.

Beint sum seinni hálvleikur byrjaði øktu runavíkingar aftur, tá Helgi L. Petersen varð feldur í brotsteiginum. Sjúrður Jacobsen var sum vant tryggur úr ellivu metrum, og so hevði NSÍ fingið fult tamarhald á dystinum.

Hetta gjørdi, at restin av dystinum gekk við heldur lágari ferð. Runavíkingar vóru nøgdir um tað, teir høvdu vunnið, og tá Skála ikki formáddi at leggja trýst á vertirnar, so hendi ikki stórt meira. NSÍ kundi kanska økt um leiðsluna, men hóast møguleikar, so fingu teir ikki meira burturúr.

Við sigrinum hildu runavíkingar fast í plássinum millum liðini, sum elta oddaliðið, HB. Hvørt hetta skal verða teirra leiklutur í ár fæst kanska ein ábending um mikudagin, tá tær spæla framskundaðu grannauppgerðina móti B68.

Skála hevur higartil bert fingið einsamalla stigið, sum heimadysturin móti B36 gav, men hinvegin hava teir ofta verið nær við at fáa úrtøku, og enn er alt ov tíðliga at avskriva nakran í stríðnum um at varðveita sessin í deildini.

### Dysturin í tølum:

**NSÍ-Skála 3-1 (2-1)**
0-1: Alexandur Johansen 20
1-1: Óli Hansen 26
2-1: Djóni N. Joensen 40
3-1: Sjúrður Jacobsen (br.) 48

**Dómari:** Birgir Sondum

**NSÍ:** Jens Martin Knudsen - Pól Thorsteinsson, Djóni N. Joensen Arnfinn Langgaard, Sjúrður Jacobsen - Jónstein Petersen, Kári Hansen, Helgi L. Petersen Gert Langgaard – Óli Hansen, Christian Høgni Jacobsen

**Skála:** Eugen Voda - Bent Djurhuus, Ronni Hansen, Rúni Rasmussen, Áki Petersen - Marius Joensen, Kári Nielsen, Pauli G. Hansen, Arnold Berg - Alexander Johansen, Dánjal Hansen

